## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin lot av landsynningi, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og sirm ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind millum landsynning og útsynning og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Lítla skrímsl góð ummæli uttanlands

Bókin Nei! segði lítla skrímsl, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út beint undan summarfrítíðini, hevur fingið serstakliga góð ummæli í bløðum uttanlands

»Ein lítil psykoanalysa«, sigur Ulrika Milles í Dagens Nyheter. Onkur annar kallar hana: »Eitt spennandi upplivilsi«. Íslendska Hildur Loftsdóttir sigur hana vera bestu bók, hon hevur lisið í langa tíð. Jú, barnabókin Nei! segði lítla skrímsl hevur fingið serstakliga góð ummæli í bløðum uttanlands. Hon kom út í fýra londum samstundis, Føroyum, Íslandi, Svøríki og Danmark.

Bókin er vorðin til í samstarvi ímillum teir tríggjar rithøvundarnar Kalle Güettler, Rakel Helmsdal og Áslaug Jónsdóttir eftir eina verkstovu á Biskops Arnö á Álandi fyri norðurlendskar barnabókahøvundar og teknarar 2001. Áslaug Jónsdóttir hevur teknað. Svenska Ulla Rhedin nevnir hetta samstarvið í grein í Dagens Nyheter 6. sept. og sigur, at henda bókin er eitt dømi um nýskapan innan myndabøkur í Norðurlondum.

Sum heitið sipar til, er bókin um eitt djarvt lítið skrímsl. Stóra skrímsl kemur at vitja lítla skrímsl, men lítla skrímsl torir ikki at lata upp, tí tað ræðist stóra skrímsl. Stóra skrímsl lýgir, stjelur, flennir at lítla skrímsli og skal altíð ráða. Ein dagin vendist í holuni, tí tá fær lítla skímsl samlað sær so mikið av dirvi, at tað torir at siga NEI! Tað løgna sum hendir er, at í staðin fyri at blíva ilt í sær, verður stóra skrímsl sum lambið og lovar at vera gott í sær og ikki gera fortreð

Søgan er eisini um at tora at siga frá, at seta mark fyri, hvussu langt ein loyvir einum øðrum at fara. Tað sermerkta við hesari bókini er, at her eru als eingir lyftir moralskir fremstafingrar. Tá ið tú sigur nei, so broytast viðurskiftini til tað betra. Tann, ið ger fortreð ella happar, fær tað eisini betri. Viðurskiftini verða so at siga á jøvnum føti.

NEI! segði lítla skrímsl er væl egnað at lesa upp fyri børnum og samstundis er nógv at tosa saman um. Hon kann vera til stóra hjálp hjá børnum, sum hava tað trupult júst av hesum at vera kúgað av øðrum.

Søgan um lítla skrímslið er eisini ein søga fyri vaksin um, at tað als ikki altíð er rætt at vera lýðin móti arbeiðsgevarum og autoritetum.

Bókin er í skapi høg og smøl, myndirnar eru klippmyndir og svarti liturin á hvítari grund er tann mest dominerandi. Gott samsvar er ímillum tekst og mynd, teksturin er einfaldur og væl umhugsaður.

NEI! segði lítla skrímsl fæst í bókabúðunum fyri 80 kr.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 18 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 25 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1010 hPa. vestan fyri Skotland fer eystureftir og dýpist. Ein hátrýstryggur, 1020 hPa. sunnan fyri Ísland fer móti Vestur-Noreg.




Hátrýstryggurin eystan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum hósmorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/09 kl. 06[00]–28/09. 06[00]. Hitin í gjár: 8,8°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 27/09 kl. 06[00]–28/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 195,1 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

22. sept.: Mánin næstur jørðini
28. sept.: Fullmáni
5. okt.: Mánin longst frá jørðini
6. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 29. sep | 07.52 | 20.13 | 06.52 | 19.13 | 07.07 | 19.28 | 09.52 | 22.13 | 10.52 | 23.13 | 06.07 | 18.28 | 05.07 | 17.28 | 08.07 | 20.28 | 09.07 | 21.28 | 07.37 | 19.58 | 08.52 | 21.13 |
| 30. sep | 08.35 | 20.56 | 07.35 | 19.56 | 07.50 | 20.11 | 10.35 | 22.56 | 11.35 | 23.56 | 06.50 | 19.11 | 05.50 | 18.11 | 08.50 | 21.11 | 09.50 | 22.11 | 08.20 | 20.41 | 09.35 | 21.56 |
| 1. okt | 09.18 | 21.40 | 08.18 | 20.40 | 08.33 | 20.55 | 11.18 | 23.40 | — | 12.18 | 07.33 | 19.55 | 06.33 | 18.55 | 09.33 | 21.55 | 10.33 | 22.55 | 09.03 | 21.25 | 10.18 | 22.40 |
| 2. okt | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |

5 707265 100036